# Ræst kjøt og tónleikur í Ålborg

**Leygardagin verður árligi aðalfundurin hildin hjá føroyingafelagnum í Ålborg. Eftir fundin verður ársveitsla við ræstum kjøti og livandi tónleiki**

ÁRSVEITSLA

*tíðindaskriv*

Nógv føroyingarfeløg eru í Danmark, men tað er ymiskt, hvussu virkin tey hava verið. Felagið í Ålborg hevur ikki havt teir bestu karmarnar seinastu árini. Føroyingarnir har hava mangla fast høli at møtast, og hetta hevur gjørt, at felagið hevur verið tætt við at detta niðurfyri. Limatalið er minkað nógv seinastu árini. Í dag liggur tað um tey 50.

Men nú tykist vend vera komin í. Nýggjar kreftir eru komnar til, og leygardagin verður so árligi aðalfundurin hildin í Østersundbys Forsamlingshus, eitt fyribils felagshús í Ålborg..

Aftan á aðalfundin, sum byrjar klokkan 17, verður ræstkjøtaveitsla. Afturvið góða matinum verður livandi tónleikur.

Felagið hevur 'lánt' teir báðar Finnur Jensen og Høgna Reistrup úr Århus at koma til Ålborg at spæla. Finnur og Høgni, sum hava spælt nógv saman, síðani teir fluttu til Danmarkar í summar - seinast í Føroyingahúsinum í Århus mikumorgunin, tá Góðan Morgun Føroyar vitjaði - hava fingið Ronni Poulsen at spæla við.

Sostatt verður talan um eina syngjandi gittartrio, sum syngur og spælir kendar føroyskar sangir og útlendskar slagarar.

Ársveitslan í Ålborg, sum byrjar klokkan 19.30 leygarkvøldið, er fyri øll. Tilmelding fer fram við at ringja til formannin Gunnleif Blaasvær á tlf 28 11 61 51.

# Mouldi selur Cippo og Manhattan

**Mouldi Manai hevur seinastu 16 árini at kalla staðið á odda fyri matstovu- og barrvirkseminum í Havn. Fyri tveimum árum síðani seldi hann Rio Bravo, og í gjár seldi hann so restina av virkseminum hjá sær – Cippo og Manhattan**



*Eftir 16 ár sum oddafiskur í býarlívinum, takkar Mouldi nú fyribils fyri seg. Hann hevur selt Cippo og Manhattan til Rúna Djurhuus og Háldan Haldansen*

SØLA

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Eg havi brúk fyri at taka mær av løttum í eina tíð. Nú fari eg heldur at standa uttan fyri vøllin sum áskoðari, sigur Mouldi Manai.

Mouldi Manai ásannar, at hesi 16 árini hava verið ein góð tíð í hansara lívi, men hann heldur tó, at tíðin nú avgjørt er komin til at taka ein steðg frá býar- og náttarlívinum:

– Matstovu- og barrvirksemi í øllum landinum er í einum ruðuleika í løtuni. Øll bjóða hvørjum øðrum av og vørurnar gerast alsamt dýrari. – Í roynd og veru er alt 'uppreklamerað', og veruleikin er langt burtur, sigur hann.

Enn veit Mouldi Manai ikki, hvat hann í næstum fer at takast við, men hann ætlar sær í øllum førum at vera áskoðari innan hesa vinnuna:

– Uppgávan hjá mær er fullgjørd, og eg havi gjørt tað væl. Í staðin fyri at gera feilir, ynski eg heldur at læra av ruðuleikanum, sum í løtuni valdar innan hesa vinnuna.

Mouldi Manai váttar, at hann hevur fingið ein góðan prís fyri Cippo og Manhattan, og at nýggju eigararnir eru Rúni Djurhuus og Háldan Haldansen. Nýggju eigararnir hava onga viðmerking til søluna.

# Útlendingastjórin frákoyrdur

Stjórin í danska Útlendingastýrinum, Grethe Løgstrup, fer úr starvi sínum tann 15. apríl.

Hetta hendir samstundis, sum ein frágreiðing frá Ríkisgrannskoðanini hevur funnist hvassliga at embætisførslunin í stýrinum.

Óskil í umsitingini og óneyðuga drúgv og fløkjaslig málsviðgerð eru millum hvassastu atfinningínar, sum eru vendar móti stýrinum.

Ikki minst hetta seinasta er eisini nakað, sum føroyingar aftur og aftur hava hoyrt, tá útlendingar hava søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi her á landi. Málsviðgerðartíðir oman fyri eitt ár, hava als ikki verið nakað óvanligt fyribrigdi, og fleiri ferðir hevur Innlendismálaráðið staðið fyri skotum av løgtingsins røðarapalli.

Afturat hesum kom í fjør fram, at talan í fleiri førum hevði verið um embætismannafusk í stýrinum, har illgruni eisini var um muturgølur. Ikki minst, tí ávísar danska fyritøkur altíð tóktust fáa skjóta og jaliga viðgerð av sínum umsóknum. Hesi viðurskifti førdu til kanningina hjá ríkisgrannskoðanini, sum nú tykist hava kostað stjóranum starvið.

**-mørk**

# 64 fráferðir um vikuna

Tey bæði feløgini, sum í summar koma at røkja flúgvingina til og úr Føroyum, hava nú kunngjørt ferðaætlanir sínar fyri summarið 2006.

Hesar vísa, at talan í háárstíðini verður um upp í 64 fráferðir um vikuna av Flogvøllinum í Vágum. Fráferðirnar verða til Danmarkar, Stórabretlands – Hetland íroknað – Íslands og til Noregs.

Á heimasíðuni, www.floghavn.fo, verður sagt, at samlaða stólatalið í summarferðaætlanini í ár verður omanfyri 240.000. Ferðafólkatalið um somu tíð í fjør var 130.000.

**-mørk**




# Bilur endaði í eini veit

Aftur í morgun høvdu fleiri bilførarar trupulleikar av hálkuni, sum í løtuni liggur kring landið.

Um 8.30 tíðina í morgun fór ein bilur av vegnum við Sundsverkið. Bilurin var á veg norðureftir, tá førarin brádliga misti harradømið á bilinum.

Bilurin fór av vegnum og endaði á líðini í rennuni við vegin. Á politistøðini í Havn verður sagt, at eingin persónsskaði stóðst av tilburðinum, men at bilurin fór rættiliga illa.

**lív**